LM-099/2023

Fylgiskjal 46

Viðmerking til uppskot til lóg um burðardygga ferðavinnu

Ætlanirnar við burðardyggu ferðavinnuni og lokalan avgerðarrætt hongur ikki saman við lógartekstinum og síggja vit fleiri vansar enn fyrimunir við hesum uppskoti.

Sum vit duga at lesa uppskotið, so verða fleiri rættindini, sum í dag liggja hjá útjaðaranum flutt til landsmyndugleikarnar, soleiðis at ferðavinnufyritøkur í meginøkinum kunnu koma til okkara bygd og troka bygdafólkið av og ganga frítt í øllum hagapørtum í kommununi.
Her skuldi heldur verið ein heimild frá kommununi, sum kann krevja, at ferðafólk ikki sleppa í hagan uttan góðkendan lokalan ferðaleiðara. Hetta kundi somuleiðis verið við til at skipa ferðavinnu í tann mun, at bólkarnir ikki gerast ov stórir og harvið var betri eftirlit við grundalagnum fyri at verja náttúruna og siðvenjuna. Hetta vildi ivaleyst betrað um samskiftið millum ferðaleiðarar og teir, sum varða av jørðini, og kundi verið við til at skapa eitt gott samstarv um frið í haganum, tá ið tað er lembing, haruskjóting o.a.

Tað er komið fyri, at bjargingarfólk og tyrla hevur verið eftir fólki uppá á fjallinum, tí tey eru komin í óføri. Eisini er tað komið fyri, at lokalir menn eru farnir niðan á fjallið eftir ferðafólki og biði tey koma oman í bygdina, tí hann hevur lovað storm og kava. Hetta hava ferðafólk ofta ikki skil fyri og til tíðir góðtaka tey ikki tíðindi um, at hann fer at køva av við mjørka seinni um dagin.
Hvør skal ábyrgdast fyri hetta ? Og hvør skal gjalda fyri bjargingina í hesum føri ?
Her skuldi tað verið fyri egna ábyrgd hjá ferðafólki at ganga í haga og at tryggingin hjá teimum er í lagi.

Vit sum ein lítil kommuna verða álagt stórar fíggjarligar útreiðslur. Talan er um gøtur, vesi, parkeringsviðurskifti o.a. alt fyri at útlendsk ferðafólk kunnu fartast sum tey vilja. Umframt hetta er sannlíkt, at smáu kommunurnar mugu økja um umsitingina, sum eisini er ein meirútreiðsla.
Tann lítla upphæddin, sum sambært hesum uppskoti verður býtt út um landið, stendur eftir okkara meting, ikki í mát við áløgdu krøvini.

Tað er ikki bara romantikkur við at fáa nógv ferðafólk til smáu bygdirnar. Nógv hevur verið tosað um ferðafólk, sum ikki duga sær hógv, tá tey koma á vitjan. Tey hyggja inn í gjøgnum vindeyguni hjá fólki, ganga inn í hjallar og seyðahús, lána wc, taka myndir av bygdafólkunum, flúgva við dronu í bygdum øki, seta bilar í túnið hjá fólki osv. Her má kommunan sleppa at avmarka talið av ferðafólki á ávísum leiðum, so at fólkið í nærumhvørvinum kann trívast.

Vit heita við hesum skrivi á landstýrismannin um at endurskoða lógaruppskotið, og seta seg saman við bóndrum, kommununum og teimum, ið dríva ferðavinnu úti um landið, og saman betra lógaruppskotið.

Vinarliga bygdaráðið í Viðareiðis kommunu